













# SPINNA GULL ÚR ULL

**Seinastu árini hava føroyingar gjørt seg alt meir galdandi á altjóða marknaðinum. Serliga hevur nógv verið at hoyrt um føroyingar, sum vinna seg fram í altjóða tónleikaheiminum. Tað eru tó ikki bara tónleikararnir, sum hava vind í seglunum. Tað eru Guðrun & Guðrun, nýggja stjørnuskotið innan sniðgeving, prógv uppá**

Fyri umleið tveimum og einum hálvum ári síðani fór Guðrun Rógvadóttir við eini seymiuppgávu til Guðrun Ludvig, sum gjørdi nakrar smærri seymiuppgávur fyri nakrar handlar. Guðrun R. vildi hava Guðrun L. at seyma skinnposar til smábørn burtur úr føroyskum seyðaskinni. Guðruni L. dámdi sera væl at arbeiða við skinninum og helt, at tað mátti kunna brúkast til okkurt annað eisini.

Tað kundi tað - Guðrun og Guðrun gjørdu av, at her var okkurt, sum var vert at arbeiða víðari við, og Guðrun L. fór í holt við at sniðgeva klædnapløgg úr seyðaskinninum.

Fyrsta stigið hjá Guðrun & Guðrun var at luttaka á stórari messu í Øksenhallen í Danmark. Hetta er ein kend messa, sum nógv søkja um at sleppa at luttaka í, men einans fá sleppa. Tær sluppu tó ígjøgnum nálareygað, og sambært Guðrun L. vórðu tær stak væl móttiknar.

Síðan hevur bara gingið framá hjá Guðrununum. Tær hava nú fimm bindikonur í Føroyum, sum gera tað, sum skal hondbindast, meðan seymingin verður gjørd í Danmark. Hvussu klæðini síggja út verður avgjørt av Guðrun L., sum er útbúgvin sniðgevi. Guðrun R., sum er cand. merc., tekur sær av tí umsitingarliga partinum av fyritøkuni.

Guðrun & Guðrun arbeiða enn nógv við skinni. Tær nýta tó eisini annað tilfar, sum til dømis ull. Ullin er ikki av føroyskum seyði, men alt verður bundið við hond her í Føroyum, og tær leggja stóran dent á at varðveita gomlu føroysku bindihættirnar. Guðrun L. sigur, at orsøkin til, at tær ikki nýta føroyska ull, er, at hon er heldur hvøss til klæðini, sum tær gera.

Hóast Guðrun & Guðrun hava stóra framgongd, eru tað mong her í Føroyum, sum ikki hava hoyrt um tær fyrr. Orsøkin til hetta er, at tær í høvuðsheitum satsa uppá útlendska marknaðin. Sambært Guðrun L. er áhugin fyri heimabundnum nógv størri í útlondunum enn í Føroyum. Hon heldur, at hetta møguliga kemst av, at siðvenjan fyri at binda sjálvur er størri í Føroyum, enn hon er í øðrum londum.

Framtíðin bjóðar uppá enn fleiri avbjóðingar fyri Guðrun & Guðrun. Í næstum skulu tær sýna fram á eini messu í París.

Guðrun L. vónar, at tær ein dag verða so væl etableraðar, at hon kann taka sær av sniðgeving burturav. At gerast sniðgevi er ein barnadreymur hjá Guðrun L., ein barnadreymur, sum má sigast vera gingin út.

Spurd um hvørji ráð hon vil geva øðrum, sum hava áhuga fyri sniðgeving, svaraði hon, at tað ræður bara um at blíva við. Tað er ein hørð vinna, sum krevur nógv arbeiði, men tá tað eydnast, er tað alt stríðið vert. So um tú gongur runt við einum lítlum sniðgeva í búkinum, er bara at koma í gongd.

Ert tú áhugað/ur í at fáa meir at vita um Guðrun & Guðrun, ella ert áhugað/ur í at síggja meir av teirra klæðum, kanst tú fara inn á heimasíðu teirra á www.gudrunoggudrun.com.






